# Kunngerð

## Broyting í býarskipanini fyri Eysturkommunu.

Við heimild í Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipan og byggisamtykt, seinast broytt við Løgtingslóg nr. 19 frá 18. mars 2013, verður við hesum uppskot til broyting í almennu byggisamtykini fyri Eysturkommunu framlagt til alment eftirlit.

Eysturkommunu býráð samtykti á fundi 27. oktober 2022 uppskot um at broyta almennu byggisamtyktina fyri Eysturkommunu fyri matr. 147d í Leirvík.

Uppskotið til broytingina snýr seg um at broyta ein part av matr. 147d frá B-øki, sum er bústaðarøki, til H-øki, sum er frílendi.

Tilfar, sum lýsir uppskotið um at broyta almennu byggisamtyktina á matr. 147d í Leirvík, liggur frammi á www.eystur.fo og á móttøkuni í býráðshúsinum í Norðragøtu, frá 14. november 2022 og til og við 08. desember 2022.

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot skulu skrivliga verða kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 30. desember 2022.







Eysturkommuna
07. november 2022